| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>01. september 2022 | Blað nr.: 696<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 01. september 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 175/22 – 192/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Turið Horn
Helena Dam á Neystabø

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 175/22 | 22/04497-2 | Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 1. september 2022 | 698 |
| 176/22 | 22/04495-2 | Ruth Vang berst frá at møta á býráðsfundi 1. september 2022 | 699 |
| 177/22 | 22/04543-1 | Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býráðsfundi 1. september 2022 | 700 |
| 178/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 701 |
| 179/22 | 16/03772-2 | Víðarisøla av matr. nr. 1322g, Tórshavn. | 703 |
| 180/22 | 21/01976-8 | Matr.nr. 159l, Nólsoy. Eigarar hava keypt hús í Nólsoy, og ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa. | 705 |
| 181/22 | 22/03746-3 | Matr.nr. 22v, Kaldbak. Umsókn um loyvi til víðarisølu. | 707 |
| 182/22 | 22/03784-1 | Søla matr.nr. 21f, Kirkjubøur. | 709 |
| 183/22 | 22/02376-2 | Høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak | 711 |
| 184/22 | 21/01680-5 | Hosufóðring av kloakkum | 713 |
| 185/22 | 22/02315-2 | Fyrispurningur um keyp av matr.nr. 479 og 480, Tórshavn | 716 |
| 186/22 | 22/03571-1 | Miðbýarkjarnan | 719 |
| 187/22 | 18/03714-1 | Serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging við Hvannasundsgøtu, matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn | 723 |
| 188/22 | 22/02915-4 | Broyting av Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna | 727 |
| 189/22 | 22/03101-1 | Hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu | 731 |
| 190/22 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 734 |
| 191/22 | 21/04609-1 | Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar | 744 |
| 192/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 749 |

**Til viðgerðar**

## 175/22 Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 1. september 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 175/22 | 22/04497-2 |

**Málslýsing**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Turið Horn, eru loknar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

## 176/22 Ruth Vang berst frá at møta á býráðsfundi 1. september 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 176/22 | 22/04495-2 |

**Málslýsing**
Ruth Vang hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Súsanna Olsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>01. september 2022 | Blað nr.: 700<br>Formansins merki: |

# 177/22 Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býráðsfundi 1. september 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 177/22 | 22/04543-1 |

**Málslýsing**
Kristianna Winther Poulsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Helena Dam á Neystabø, eru loknar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 178/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 134/22 | 22/00011-1 |
| 7 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 178/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 179/22 Víðarisøla av matr. nr. 1322g, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 330/16 | 16/03772-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 204/22 | 16/03772-2 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 179/22 | 16/03772-2 |

**Málslýsing:**

**Upplýsingar uppá ognina.**
Matr.nr . 1322g, Tórshavn.
Óðinshædd 11
Óbygt vinnugrundøki.
Vídd 3.732m2
Tinglýst 03.01.2007
Keypsprísur 2.073.835,08

P/f Postverk Føroya selur óbygt grundstykki á Óðinshædd, matr. nr. 1322g, Tórshavn, til Sp/f Jóan Petur Vang.

Vísandi til at talan er um óbygt grundstykkið, krevst loyvið frá Tórshavnar kommunu til víðarisøluna.

Postverkið hevur ongar ætlanir um at byggja á stykkinum, og vendi sær í 2013 til kommununa við áheitan um at kommunan keypti grundstykkið aftur.

Fíggjarnevndin samtykti 13.03.2013, ikki at taka stykkið innaftur, men bjóðaði seg til at hava grundstykkið á sølulista hjá kommununi.

Postverkið hevur síðani fingið keypara til stykkið, sum bjóðar kr. 2.500.000,00 uppá grundstykkið.

Tilmæli:

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at, at loyva víðarisølu av grundstykkinum, men skal søluprísurin vera upprunaprísurin kr. 2.073.835,08

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Sakførari eigarans hevur sent kommununi henda fyrispurning:

Ætlanin er nú at byggja á stykkinum.´

Tað er ætlanin, at eitt nýskapað felag kemur at eiga stykkið og bygning. Tað verður gjørt við eini kloyving av SP/F Jóan Petur Vang sbr. Vinnufelagslógini, soleiðis at hetta stykkið verður skotið inn í eitt nýskapað felag SP/F Óðinshædd 11. Men eigaraviðurskiftini av kapitalinum í nýskapaða felagnum verða tey somu sum í SP/F Jóan Petur Vang. Eigarin av SP/F Jóan Petur Vang er SP/F JPH Holding, sum Jóan Petur

eigur 100%. Nýggja felagið kemur SP/F JPH Holding og soleiðis Jóan Petur somuleiðis at eiga 100%. Tvs. ongin verulig broyting í eigaraviðurskiftunum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at loyva víðarisølu, vísandi til, at talan er um sama holdingfelag, ið eigur felagið, ið kemur at eiga ognina.

Loyvið til víðarisøluna, er treytað av, at sølan fer fram við víðarisølu skeyti, sum vísir til galdandi servituttir og at víðarisøluprísurin er kr. 3.646.273,- ( Sambært upplýsingum frá sakførara er talan um upprunaligan kostprís fyri grundøkið + eftirfylgjandi útreiðslur til jørðarbeiði og planering fram til 31.12.2021 hjá Sp/f Jóan Petur Vang)

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 180/22 Matr.nr. 159l, Nólsoy. Eigarar hava keypt hús í Nólsoy, og ynskja at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 202/22 | 21/01976-8 |
| 2 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 180/22 | 21/01976-8 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur sent kommununi umsókn við teldubrævi. 14.07.2022.

**Lýsing av málinum.**

Óbygt grundstykki matr.nr. 159l, Nólsoy.
Vídd 507m2.
Grundstykkið er ógrivið.

Keyparar hava keypt grundstykkið við tillutan fyri kr. 165.000,00
Skeytið tinglýst 17.06.2021.

Keyparar hava nú keypt sethús í Nólsoy, og hava tískil ikki tørv á grundstykkinum, og heita á kommununa um at keypa grundstykkið aftur.

Sambært grein 4 í skeytinum framgongur millum annað. Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal. Umsókn frá eigara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>01. september 2022 | Blað nr.: 706 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla til at keypa grundstykkið innaftur, fyri uppruna prís sum er 165.000,00

Verandi eigari ( seljarin ) rindar allar útreiðslur í samband við afturkeypið, í hesum føri er talan um útreiðslur til tinglýsing sum eru 2.650,00 kr.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 181/22 Matr.nr. 22v, Kaldbak. Umsókn um loyvi til víðarisølu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 203/22 | 22/03746-3 |
| 2 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 181/22 | 22/03746-3 |

**Upprunin til málið.** Eigari hevur sent kommununi teldubræv, har hann greiðir frá, at hann hevur keypt hús á Hvítanesi, og at hann tí søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum. matr.nr. 22v, Kaldbak.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 22v, Kaldbak. ( Við Krossá 14 )
Talan er um grundstykki omanfyri vegin. Vídd 544m2.
Grundstykkið er óútgrivið. Stórur hæddarmunur er í lendinum.

Fyrstu grundstykkini í útstykkingini vórðu seld í 2009.

Tað hevur gingið sera seint við sølu og bygging í útstykkingini.

Í útstykkingini eru 10 stykkir, og liggja 4 teirra framvegis óbygd.

Býráðið samtykti í 2017, at lýsa óseldu grundstykkini alment til sølu hjá Ognarmeklara. 6 grundstykkir komu tá á sølulista hjá ognarmeklara, sum metti søluvirðið á stykkjunum til 411,5 kr.m2, svarandi til 223.856,- kr. fyri matr.nr. 22v, Kaldbak.

Nevnda stykkið var í 01.06.2018 selt fyri 210.000,00 kr.

Viðmerkjast kann, at flestu stykkini í útstykkingini í Kaldbak, hava havt fleiri eigarar, og hava 4 eigarar frammanundan søkt um í fyrsta lagi at lata sítt grundstykki innaftur til kommununa, ella at fáa loyvi til víðarisølu. Kommunan hevur tá samtykt, ikki at keypa stykkini aftur, men í staðin at loyva víðarisølu, vísandi til at stykkini eru seld í fríðari sølu.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn og kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, ikki at keypa grundstykkið aftur, men í staðin at loyva víðarisølu av grundstykkinum, vísandi til at grundstykkið er selt í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>01. september 2022 | Blað nr.: 709 |
| | Formansins merki: |

# 182/22 Søla matr.nr. 21f, Kirkjubøur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 205/22 | 22/03784-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 182/22 | 22/03784-1 |

**Upprunin til málið.** Býráðið samtykti 28. 04.2022, at keypa óbygda grundstykkið aftur, og at selja stykkið aftur hjá meklara í fríðari sølu. Sí mál 14/03352.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 21f. Kirkjubøur.
Vídd 806m2.
Óplanerað grundstykki.

Grundstykkið hevur staðið til sølu hjá Meklarin.fo. Mett søluvirðið var ásett til kr. 750.000,-

Hægsta boð var áljóðandi 850.000,-

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja stykkið fyri innkomið boð kr. 850.000,00

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 183/22 Høli til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.08.2022 | 170/22 | 22/02376-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 195/22 | 22/02376-2 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 183/22 | 22/02376-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 22/02376-2 |

**Upprunin til málið**
Samtykt frá mentamálanevndini tann 9. mars 2022 í máli nummar 22/00948 um útvegan av hølum til frítíðarskúla í Kaldbak

**Lýsing av málinum**
Neyðugt er at útvega frítíðarskúlanum og ungdómstilboðnum í Kaldbak nýggj høli. Til fyri kortum hevur frítíðarskúlin og ungdómstilboðið hildið til í Flatnagarði, sum er dagstovnur. Flatnagarður rúmar tó ikki øllum børnunum, og tí hevur frítíðarskúlin í eina tíð verið í skúlanum.

Hetta hevur víst seg ikki hepnast so væl, tí frítíðarskúlavirksemið ávirkar undirvísingina, og at umstøðurnar annars ikki eru so væl egnaðar til námsfrøðiliga virksemið.

Hetta skúlaárið verða tað skúlaár 16 frítíðarskúlabørn. Í Kaldbaks skúla verður forskúli eftir summarsteðgin, og við hesum verður frítíðarskúlin fyri fýra floksstigum. Hesi rúmast ikki í verandi hølum í skúlanum, ei heldur á dagstovninum.

Átroðkandi tørvur er tí at fáa loyst hølisspurningin fyri frítíðarskúlan og ungdómstilboðið í Kaldbak, soleiðis at hetta kann standa klárt eftir summarsteðgin.

Viðvíkjandi varandi loysn, so er eftir ástaðarfund, har umboð fyri bygingsdeildina, barna- og ungdómsdeildina, dagstovnaleiðalran o.ø. vóru við, semja um, at besa besta loysnin er at útvega ella byggja lonir, sum eru í umhvørvinum við skúlan, nýggju høllina og spæliplássið. Hóast at talan er um tvær verkætlanir, so er vert at kanna, um bygging av frítíðarskúla og høll kann samskipast í ávísan mun.

Komandi skúlaár verða 16 næmingar í frítíðarskúlanum. Fyri at tryggja, at ein loysn eisini heldur í fleiri ár fram, ið kann lofta einum vaksandi barnatalið í Kaldbak, verður mett neyðugt at byggja høli, sum kunnu rúma upp til 26 næmingum.

Samstundis vil ein hølisloysn til frítíðarskúlan og ungdómstilboðið eisini gera, at trýstið á dagstovnin minkar.

Sum fyribilsloysn er semja við samkomuna Nazareth um leigu av hølum til frítíðarskúla. Hetta er beint við skúlan. Leigumál verður lagt fyri fíggjarnevndina (mál 22/03249).

**Krøv til nýggj høli**
Neyðugt er við einari loysn, sum kann rúma upp til 26 frítíðarskúlanæmingum, umframt starvsfólkum og ungdómsklubbanum.

Ein hóskandi loysn má tí í minsta lagi innihalda inngongd og garderobu, har tað er lætt at lata seg í/úr útiklæðum, tvey vesi til børnini, tvey rúm, har eitt er felagshøli og hitt aktivitetsrúm/verkstaður, køk ella køksøki í felagshølinum, starvsfólkarúm og starvsfólkavesi. Umframt hetta er eisini neyðugt við rúmi til reingerð og tekniskar installatiónir.

**Fyrireikingar**
Bygningsdeildin hevur mett tørv á játtan í sambandi við fyrireikingar til útbjóðing av verkætlanini í heildararbeiðstøku. Mett verður, at upphædd kr. 300.000 er nøktandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Leigumál Nazareth 22/03249)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | Ja | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 300.000 til fyrireikingar og at fáa til vega kostnaðarmeting av nýggjum hølum til frítíðarskúla og ungdómstilboð í Kaldbak av løgukarmi LK31015 Tillagingar á dagstovnaøkinum til nýggja løgukontu Frítíðarskúli í Kaldbak, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Harumframt verður mælt til at beina staðseting av hesum bygningi í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndinin og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 184/22 Hosufóðring av kloakkum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 30/21 | 21/01680-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 123/21 | 21/01680-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 151/21 | 21/01680-5 |
| 4 Tekniska nevnd | 22.08.2022 | 52/22 | 21/01680-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 198/22 | 21/01680-5 |
| 6 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 184/22 | 21/01680-5 |

**Upprunin til málið**
Eftir gjøgnumgongd av støðulýsingunum, ið blivu gjørdar í 2018, har 14 km av kloakk bleiv filmað, varð úrslitið, at sera stórir partar av kloakkunum mugu umvælast.

**Lýsing av málinum**
Tað er sera dýrt og tíðarkrevjandi at endurnýggja kloakkir, tískil mugu vit hugsa alternativt. Í DK hava veitarar í meira enn 40 ár arbeitt við at fóðra kloakkir, t.v.s. umvælt kloakkirnar innanífrá, soleiðis at vit sleppa undan at grava vegir, gongubreytir og kantsteinar upp, men heldur byggja eitt nýtt rør, undir jørðini. Hetta er nógv bíligari, og til lítlan og ongan ampa fyri borgaran - við tað at arbeiðið verður avgreitt uttan graviarbeiði og tað verður gjørt uttan longri tíðarbil við uppgrivnum vegum, ið tarna ruskinnsavnan og annars kann verða til ampa fyri borgaran. Fleiri av teimum strekkjum ið blivu filma treingja til ábøtur, og liggja leiðingar her m.a. undir bygningum og yvir um høvuðsvegir. Tey strekkir, sum verða fóðrað, eru uml. 1,3 km samanlagt og mettur kostnaður er kr. 3 mió.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Arbeiðið verður avgreitt sambært sáttmála, har veitari heldur seg til Abt93.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Rakstrarstøðin hevur staðið fyri samskifti við Aarsleff

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | Minni umsiting, | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | Minni dálking | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | Skjótt og bíligt í mun til grevstur | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Peningurin uppá 3,0 mió. verður fíggjaður av konto 6875, og talan er um eitt strekki uppá 1,3 km.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 3.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 3.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato mai-aug. 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 3.000.000 | 6875 | nýggj | | 6875 | L00001 og L00002 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk 1.911.000 | 6875 | nýggj | | 6875 | L00001 | | | |
| Dkk 1.089.000 | 6875 | Nýggj (sama) | | 6875 | L00002 | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at:
- Upphædd uppá kr. 1.911.000 verður játtað av konto 6875, L00001, Løgukarmur fyri árið 2021
- Upphædd uppá kr. 1.089.000 verður játtað av konto 6875, L00002, framfluttur løgukarmur 2020
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Royndirnar við hosufóðring í 2021 hava verið góðar. Tað blivu uml. 1,2 km av kloakkleiðing filmað og spulað, síðani fóðrað, og at enda aftur filmað til tess at skjalprógva arbeiðið. Kostnaðurin var uml. 3 mió kr, og gevur hetta ein kostnað á í miðal kr. 2.500 fyri meturin. Her er tá talan um leiðingar, sum í flestu førum liggja undir bygningum, á privatum øki ella undir vegum við nógvari ferðslu. Afturat sjálvari fóðringini komu eyka arbeiðir í sambandi við, at nakrir verandi brunnar á leiðingunum máttu umvælast ella skiftast, og í onkrum førum máttu nýggir brunnar etablerast. Harasturat vóru kostnaðir í samband við kunning til borgarar o.l. Hesar eyka útreiðslur vóru tá uml. kr 400.000.

Ætlanin er at halda fram við hesum arbeiðinum í september 2022, og verður í tí sambandinum tørvur á kr. 3.400.000 til at fremja arbeiðið í august-september 2022. Her er ætlanin, at 1,1 km av kloakkleiðing verður

fóðrað, og avleidd arbeiðir verða gjørd. Á konto 6875 Kloakkir (íløgur), L68040 Hosufóðring av kloakkum, eru í løtuni kr. 508.000. Tí er tørvur á, at játtaðar verða kr. 2.892.000 til hesa løgukontu.

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 6875 | L68040 | Hosufóðring av kloakkum | | 2.892.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.400.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og Býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til, at játtaðar verða kr. 2.982.000 á konto 6875 Kloakkir (íløgur) av løgukarminum LK68999 Kloakkir á løgukontuna L68040 Hosufóðring av kloakkum undir somu konto 6875 Kloakkir (íløgur). Eisini verður mælt til at játta umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakarar um arbeiðið at hosufóðra kloakkirnar og gera avleidd arbeiðir í hesum sambandi. Mælt verður til, at málið verður beint umvegis fíggjarnevndina í Býráðið.

**Tekniska nevnd 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 185/22 Fyrispurningur um keyp av matr.nr. 479 og 480, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 160/22 | 22/02315-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 197/22 | 22/02315-2 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 185/22 | 22/02315-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá ánara á matr.nr. 477, Undir Glaðsheyggi.

**Lýsing av málinum**
Ánarin á matr.nr. 477, undir Glaðsheyggi 1, sigur seg hava ampa av teimum sponsku hindberunum, sum vaksa á grannaøkinum, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu. Ánarin søkir tí Tórshavnar Kommunu um at keypa matr.nr. 480, part av matr.nr. 479 og part av vegmatriklinum bs.

Økið, ið søkt verður um, er áleið 60 fermetrar til støddar. Partur av matr.nr. 479 liggur sum vegøkið.
Víst verður til skjøl *»22/02315-6 Umsøkta økið«*, *»22/02315-5 Undir Glaðsheyggi_2«, »22/02315-5 Undir Glaðsheyggi_3 « og »22/02315-9 Undir Glaðsheyggi_markera«*

Á loftmyndum heilt aftur til 1984 sæst týðuliga, at vøkstur hevur verið á kommunalu ognunum. Sponsku hindberini hava røtur undir Amtmansgarðin og plantan verjir og styrkir sjálvan garðin í Amtmansgarðinum. Tórshavnar kommuna hevur skrásett, at sponsku hindberini vaksa á økinum, og hevur ruddað sponsku hindberini, men torført er at burturbeina plantuna heilt Mold er løgd omaná. Sponsk hindber, eisini kallað laksaber, er ein innræsiin planta, ið spjaðir seg og ger seg inn á annað plantulív.

Ánarin hevur í samrøðu við kommununa játtað, at um møguleiki ikki er at keypa ongirnar, so er ánarin áhugaður í at fáa eina avtalu um ræðisrætt í lag.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Almenna byggisamtyktin*
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, har tað m.a. er ásett:
- 2. grundumráði verður alt, sum tað er, lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvíst verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

*Matrikullógin*

§ 17.1) Við sundurbýti má lutur ikki verða lagdur í sovorðnum skapi, at hann er óhentur til endamálið. Harundir má partur í felagseigindómi uttangarðs altíð hoyra til ávísan fastan eigindóm í somu markatalsbygd.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Partur av økinum í umsóknini, liggur sum vegøki, ið hevur til endamáls at hýsa ferðslu og leiðingum.

Vegøki hjá Tórshavnar Kommunu tryggja, at møguleiki er fyri:
- komandi breiðkanum av vegi og komandi gonguteigum
- komandi leiðingar í vegi og bygningar til tess.

Víst verður á, at vegøki tí kunnu hava eitt endamál bæði á økinum, men eisini undir jørð. Á økinum, ið søkt er um, liggja somuleiðis leiðingar hjá Tórshavnar Kommunu og hjá SEV.

Umsitingin mælir frá at ganga umsóknini um sølu á møti. Víst verður á, at vegurin Undir Glaðsheyggi er smalur, og partur av vegnum liggur á privatum ognum. Verður tørvur á at breiðka vegin, gera fleiri parkeringspláss ella leggja leiðingar, er neyðugt at hava økið til tess.

Mett verður, at frábýti av vegøkinum kann verða í stríð við § 17 í »Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m«, tí endamálið við vegnum – at leiða ferðslu – ikki longur kann røkkast. Tað er Umhvørvisstovan, ið er matrikulmyndugleiki, og tí myndugleikin, ið tekur avgerð um matrikulmál kunnu gangast á møti.

Umsitingin mælir til at geva umsøkjaranum ræðisrætt á parti av søkta økinum, ið er økið, sum liggur millum Amtmansgarðin, og laðaðan garð út móti vegnum Undir Glaðsheyggi. Víst verður til kortskjal »22/02315-9 Undir Glaðsheyggi_markera«. Og at gera avtalu við umsøkjaran, sum neyvt lýsir, at ræðisrætturin gevur rætt til viðlíkahald av økinum, men at loyvi ikki er at byggja á økinum. Avtalan skal eisini greitt lýsa, at Tórshavnar Kommuna ikki bindur seg fíggjarliga til viðlíkahald av økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/02315-1 Keyp av matr.nr. 478 og 479,Tórshavn
22/02315-5 Undir Glaðsheyggi_2
22/02315-5 Undir Glaðsheyggi_3
22/02315-6 Umsøkta økið
22/02315-9 Undir Glaðsheyggi_markera

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læттar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Kommunustjórin, leiðarin á byggimálsdeildini, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla frá at selja økið vísandi til, at tørvur er á vegøkjum til leiðingar og komandi vegagerð ella parkeringsbásar. Eisini verður mælt til, at kommunan bjóðar umsøkjaranum at gera eina avtalu um ræðisrætt á økinum, sum fevnir um viðlíkahald, plantan og fríðkan av økinum, har tað ikki verður loyvt at byggja á økinum. Avtalan skal verða treytað av, at Tórshavnar Kommuna ikki bindur seg fíggjarliga til viðlíkahald, fríðkan og plantan av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Tikið av skrá.

## 186/22 Miðbýarkjarnan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 157/22 | 22/03571-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 200/22 | 22/03571-1 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 186/22 | 22/03571-1 |

**Upprunin til málið**
Ein býarkjarna er tað handilsliga, mentunarliga, søguliga og landafrøðiliga hjarta í einum býi. Ein miðbýarkjarna eigur at verða innbjóðandi og at leggja upp til, at fólkið hittist og hevur fyrsta rætt til infrakervið og hentleikar til bústaðir.

Hetta ynskir kommunan at stimbra undir, og hava tríggir ráðgevar fingið møguleika at lata inn tilboð uppá arbeiðið at útvega eitt skipanaruppskot/faldara av miðbýarkjarnuni, sí fylgiskjal *Útbjóðingartilfar* og *Dagført økið*.

Í mong ár hevur miðbýarkjarnan í Tórshavn verið merkt av bilferðslu. Bilurin hevur fyrsta rætt til flestu økini, og parkering fyllir nógv. Harafturat mugu vit ásanna, at vit búgva í einum vetrarbýi, og innrættingin av býnum átti í størri mun at tikið atlit til hetta.

Ein part av árinum hava vit tómar gøtur og eina so at siga lívleysa miðbýarkjarnu, ein sokallaðan “donut-bý”. Orsøkin til hetta er m.a., at keyp á alnótini, hevur gjørt tað gjørligt at fáa sínar vørur flýggjaðar til úthurðina, umframt at kappingin frá handilsmiðstøðum er økt. Okkara býarkjarna hevur tørv á at fóta sær og livna upp aftur.

Ynski er at endurskoða miðbýarkjarnuna í tann mun, at býurin verður tættaður við fleiri bústøðum og trivnaðarligum átøkum, sum fær vitjandi at støðast, samstundis sum at eyðkennið í miðbýnum verður varðveitt og styrkt. Her verður serliga hugsað um at varðveita tær mongu smogurnar, ið binda býin saman, smáu og snøggu býarhúsini við mønutaki, umframt bygningar so sum gamla Føroya Banka, Ebenezer, gamla Sparikassan, Býráðið, Margarinfabrikkina/Tjóðpallin.

Faldarin, sum verður latin kommununi, kemur at liggja til grund fyri framtíðar skipanini av miðbýnum, og verður grundarlagið undir eini komandi serstakari byggisamtykt.

Fyrsta juli móttók kommunan trý tilboð, sum verða lýst niðanfyri, sí fylgiskjøl *Henning Larsen, SNA, BRIM og BRIM-dagførdur prísur*.

**Lýsing av málinum**
Í útbjóðingarskrivinum, varð biðið um tilboð uppá arbeiðið umframt eina frágreiðing av, hvussu uppgávan verður loyst.

| | |
|---|---|
| SNA lat tilboð inn áljóðandi | kr. 800.000 u/mvg |
| Henning Larsen lat tilboð inn áljóðandi | kr. 840.000 u/mvg |
| BRIM lat tilboð inn áljóðandi | kr. 850.850 u/mvg |

SNA hevur lægsta tilboðið. I tilfarinum frá SNA er víst á áhugaverd diagrammir, men eingin fullfíggjað frágreiðing fyriliggur, og tí er ringt at skilja akkurát, hvussu arbeiði verður framt. Serligt fyri hetta tilboðið er, at grønu økini (býarparkin) verða viðgjørd við princippskitsum og plantuplani.

Tilboðið frá Henning Larsen er eitt sindur lægri enn hægsta tilboðið. Tilfarið, sum tey hava latið inn, er sera gott við greiðum tekningum og lýsingum, av hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at alt arbeiðstøkuøkið verður teknað upp í talgildum 3D-forriti. Harumframt verða mikroklimatiskar greiningar gjørdar av býnum við at nýta planleggingarforritið *GreenScenaro*, ið sameinar greiningar og simuleringar av m.a. trivnaði hjá fólki og skugga, sól-, vind- og ljósviðurskifti. Hetta er ein áhugaverdur háttur at arbeiða uppá, sum vit ikki hava roynt fyrr í Tórshavnar kommunu. Hetta gevur kanningarúrslitinum objektivitet og gjøgnumskygni. Umframt hetta verður heitið "Urtagarðsbýurin" nýtt, ið er ein tulking av visiónini úr útbjóðingartilfarinum um eina býarpark. Tey citera Jørgen Franz Jacobsen:

*Í allar ættir er grønur gróður. Niðan ímillum urtagarðar, klettar og hús sker ein long spákingarleið við nógvum gongufólki. Hálvdoyvt ljóð av samrøðum teirra rennur út í sjóðið av ánni. Øll, sum hava verið í Havn, kenna tað: áin, sum rennur í skugganum av trøunum. Tað er sovorðin eyðkendur blíður dámur um henda gróðurgyrda [býin].*

og vísa á, at tey vilja endurskapa Tórshavn sum ein urtagarðsbý.

BRIM hevur hægsta tilboðið. Tilfarið frá BRIM er væl úr hondum greitt við neyvari frágreiðing um, hvussu arbeiðið fer fram. Serligt fyri hetta uppskotið er, at dentur verður lagdur á at arbeiða við eini neyvari endurtøku av analysum og uppskotum til býarskipan, ein sokallað repitativ process. Hetta merkir, at neyvar kanningar ligga til grundar fyri uppskotunum tey koma við.

Umsitingin hevur mett um innkomnu uppskotini, sí fylgiskjal 'Meting av tilboðum'. Allir ráðgevarnir hava latið inn nøktandi tilfar, men uppskotið frá Henning Larsen er tað, sum umsitingin metir á bestan hátt líkur ynskini fyri miðbýin og kappingartreytirnar. Umsitingin mælir til, at Henning Larsen fær í boði at gera skipanina av miðbýarkjarnuni. Uppskotið vísir á eina framúr spennandi tilgongd til arbeiðið, umframt at tey útvega eina talgilda upptekning av býnum í 3D, ið er eitt sera virðismikið tilfar í tí víðari menningini av økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu og undirliggjandi serstakar byggisamtyktir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/03571-5 Útbjóðingartilfar
22/03571-3 Dagført økið
22/03571-3 SNA
22/03571-3 Henning Larsen
22/03571-2 BRIM
22/03571-3 BRIM – dagførdur prísur
22/03571-6 Meting av tilboðum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>01. september 2022 | Blað nr.: 721<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum | 6275 | Nýggj | Miðbýar-kjarnan | Ja | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | - |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- játta 1 mió. kr. til verkætlanina av konto 6275, L62052 Fríðkan av bygdunum
- heimila umsitingini at gera sáttmála við vinnandi ráðgevan
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson settu fram broytingaruppskot um at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at 1 mió. kr. verða játtaðar til verkætlanina av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

Broytingaruppskotið varð samtykt við trimum atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen, ið mæltu til, at peningurin, ið játtast skal til verkætlanina verður tikin av tøkum peningi heldur enn av konto 6275, L62052, Fríðkan av bygdunum ella av LK31011, Útbygging dagstovnurin á Hamrinum.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá minnilutanum um at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at játtanin verður tikin av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Turid Horn og Annika Olsen.

# 187/22 Serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging við Hvannasundsgøtu, matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.11.2018 | 210/18 | 18/03714-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 279/18 | 18/03714-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 105/22 | 18/03714-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 128/22 | 18/03714-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 156/22 | 18/03714-1 |
| 6 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 187/22 | 18/03714-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 12. september 2018 at loyva íbúðarbygging á matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn, og í hesum sambandi at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá eigara av matr. nr. 999a og 999ai, Tórshavn, um at fáa loyvi at byggja íbúðir á økinum. Talan er um ein bygning í tveimum hæddum, við tilsamans 18 íbúðum, við tilhoyrandi goymslurúmum. Hvør íbúð er uml. 78 $m^2$ til støddar, og hevur tvey kømur. 27 p-pláss eru á felags parkeringsøki – sambært almennu byggisamtyktini skal minst 1 p-pláss verða fyri hvørjar 75 $m^2$ íbúð, og eru sostatt fleiri p-pláss, enn minstakravið í almennu byggisamtyktini. Harumframt er øki lagt av til felags spælipláss, sí kortskjal *Skipan*. Vegatkoma verður frá Hvannasundsgøtu.

Økið liggur í A1 økið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri A1 øki *"kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir".* Á ognini stóð áður ein vinnubygningur, sum er tikin niður

Økið liggur í bústaðarøki við stak- og tvíhúsum, og er avmarkað av Heygsvegnum fyri eystan og Hvannasundsgøtu fyri vestan. Eitt sindur av lendismuni er ímillum Hvannasundsgøtu og øki byggisamtyktarinnar, og er hetta somuleiðis við til at avmarka økið. Innan tað natúrliga avmarkaða økið liggur eitt annað stakhús.

Í mun til ljósviðurskifti og útsýni verður ikki mett, at nýggi bygningurin ávirkar grannalagið nógv øðrvísi, enn niðurtikni bygningurin gjørdi.

Serstaka byggisamtyktin tryggjar fleiri íbúðir í býnum og býartættar í ein ávísan mun, og er hon sostatt í tráð við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru m.a.:
§ 5. Ásetingar fyri umráðispartin A1 í 3. Grundumráði

Stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

Stk. 9. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, ið eru í stk. 5, tá ið økið verður roknað sum heild.

Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddar ásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/03714-23 Serstøk byggisamtykt matr 999a Hvannasundsgøta pdf.
18/03714-23 Kortskjal 1
18/03714-23 Kortskjal 2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina við Hvannasundsgøtu sambært skjølunum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at nýggja serstaka byggisamtyktin fyri íbúðarbygging við Hvannasundsgøtu hevur ligið til almenna hoyring, frá 14. desember 2018 til 25. januar 2019, eru trý mótmæli og eitt broytingaruppskot innkomin, øll frá grannum við Heygsvegin og á Hvannasundsgøtu.

Viðurskiftini, ið verða førd fram í mótmælunum, eru í høvuðsheitum hesi:

1. Mett verður ikki, at Hvannasundsgøta er egnað til øktu ferðsluna, av tí at har er smalt og ongar gongubreytir eru.
2. Mælt verður til at brúka verandi íbindingarveg við Heygsvegin ístaðin. Tað verður ikki mett at vera ein trupulleiki við tveimum íbindingarvegum, ið liggja tætt, av tí at Heygsvegurin er góður og breiður, við lítið av ferðslu.
3. Vegna manglandi vendipláss á Hvannasundsgøtu verður tað mett at vera óráðiligt at loyva einum stórum bygningi afturat.
4. Eigarin av matr. nr. 999ac ynskir at fremja makaskifti við matr. nr. 999a, soleiðis at hóskandi vegur kann gerast frá Heygsvegnum niðan á íbúðarøkið.
5. Grannarnir ynskja, at tað í serstøku byggisamtyktini verður sett treyt um, at íbúðarbygningurin ikki má staðsetast nærri enn 8,5 m frá markinum eystureftir móti Heygsvegnum. Hetta fyri at varðveita dámin á sethúsabýlinginum.
6. Grannarnir ynskja somuleiðis, at tað verður sett treyt um, at planeringshæddin á matr. nr. 999a og 999ai ikki kann verða hægri enn 5 metrar undir Hvannasundsgøtu.

Umboð fyri umsitingina hava verið á ástaðarfundi við umboð fyri grannalagið, har grannarnir vístu á ferðsluviðurskiftini í økinum, og greiddu nærri frá broytingaruppskotinum, sum leggur upp til, at íbúðarbyggingin nýtir verandi íbindingarveg, sum er í Heygsvegin.

Ad. 1-4. Umsitingin metir broytingina, sum er nevnd í viðmerking 4, vera skilagóða, og er hon viðgjørd av ferðslunevndini, sum somuleiðis tekur undir við henni. Sostatt verður makaskifti framt millum matr. nr. 999ac og 999a framt, og verandi vegatkoman frá Heygsvegnum betra og nýtt sum atkoma til økið. Uppskotið til serstaka byggisamtykt verður broytt sambært hesum, og verður lagt til almenna hoyring av nýggjum.

Ad. 5. Skipanin av økinum skal verða sambært kortskjølunum í serstøku byggisamtyktini, ið vísir at ein ávís frástøða til sethúsaøkið verður hildin, sí *kortskjal 2.*

Ad. 6. Planeringshæddin verður ásett av byggivaldinum sum vanligt, við atliti til verandi lendi, veg og grannastykkir.

Nøkur ár eru fráliðin, síðani málið var viðgjørt seinast, og nú er nýggjur eigari av ognini. Í hesum sambandi er verkætlanin tillagað, t.d. er íbindingarvegurin fluttur sambært pkt. 4 í viðurskiftunum, í ískoytinum omanfyri og talið av íbúðum, goymslurúmum og parkeringsplássum er lækkað. Annars er skipanin av økinum tann sama.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina sambært viðhefta skjali, *Serstøk byggisamtykt við Hvannasundsgøtu 07.04.22*, j.nr. 18/03714-24, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina av uppskotinum til serstaka byggisamtykt fyri Hvannasundsgøtu, er viðmerking komin frá grannum á Hvannasundsgøtu 2-16, 36 og 34, sí skjal *Nýggj serstøk byggisamtykt við Hvannasundsgøtu.pdf.* Niðanfyri er ein bólking og samandráttur av viðmerkingunum.

1. Viðmerkingar til tilgongdina
- Víst verður á, at uppskotið til byggisamtyktina er gjørt og tillagað við beinleiðis ynski frá privata byggiharra, og grannar føla, at tað eigur at verða tikið minst líka nógv atlit til tey í hesi tilgongd.
2. Uppskot til broyting

Víst verður á, at í tilgongdini hevur økið skift eigara, og harvið er projektið broytt trýggjar ferðir, og at tað í dag er 2 m hægri enn tað fyrsta uppskotið.

- Heitt verður á býráðið, at hækkingin av bygningunum "skal verða niðureftir" og í hvussu so er planerað 2 m lægri enn upprunaliga ætlað sambært skjalinum "Tvørskurður av lendi", dagfest 11. mai 2018 (skjal nr. 18/00510-2).
- Soleiðis ynkja grannarnir, at orðingin verður í byggisamtyktini:
  "*Planeringshæddin á íbúðarbygninginum má ikki vera hægri enn planeringshæddin á grannabygninginum, ið er bygdur á matr. nr. 999v (Heygsvegur 34).*"

Ad 1. Serstakar byggisamtyktir verða gjørdar út frá heilt greiðum mannagongdum. Tað er ikki óvanligt, at serstakar byggisamtyktir verða framleiddar og viðgjørdar í mun til ítøkiligar verkætlanir. Í viðgerðini verða atlit millum annað tikin til almennar byggiligar ásetingar, og í tilgongdini er vanlig mannagongd, at byggisamtyktaruppskotið verður lagt til almenna hoyring. Endamálið við almennu hoyringini er at geva grannum og borgarum møguleika at koma til orða og viðmerkja uppskotið. Hetta er mannagongd, ið altíð verður fylgd. T.d. bleiv verkætlanin í 2019 tillagað eftir innkomnum mótmæli og broytingaruppskoti frá grannum um atkomu til økið.

Ad 2. Planeringshæddin verður ásett av byggivaldinum við atliti til verandi lendi, veg og grannastykkir, og verður hetta vanliga gjørt í ítøkiligu byggimálsviðgerðini, um planeringshæddin ikki er neyvt ásett í almennu byggisamtyktini. Vísast kann til BK17, skjal 1A, 1.4, stk. 1, nr. 1 og 2 og almennu byggisamtyktina kap. IV, § 28, nr. 9, um tey atlit, ið byggivaldið skal taka í mun til ásetingina av planeringshæddini.

Tí verður ikki mælt til at seta eitt krav um planeringshædd sambært uppskotinum frá grannum, men at byggivaldið ger hetta í tí ítøkiligu byggimálsvigðgerðini, tá privati byggiharrin hevur søkt um byggiloyvi. Ikki fyrrenn tá kann umsitingin fara út á stykkið at máta upp og gera endaligu metingar í mun til planeringshædd.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Hvannasundsgøtu og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 188/22 Broyting av Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 140/22 | 22/02915-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 154/22 | 22/02915-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.08.2022 | 166/22 | 22/02915-4 |
| 4 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 188/22 | 22/02915-4 |

**Upprunin til málið**
Byggiloyvi hevur verið givið til tilbygning til Nólsoyarstovu matr.nr. 50, Gongin 10, Tórshavn.
Í sambandi við kæru av byggiloyvinum hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at ógilda avgerðina um byggiloyvið til tilbygningin. Føroya Kærustovnur mælir til, at byggisamtyktin verður tillagað soleiðis, at bygningurin kann verða játtaður.

Gongdin í málinum:

23. mars 2020 móttekur Tórshavnar kommuna umsókn um byggiloyvi til endur- og umbygging av Nólsoyarstovu matr. nr. 50, Gongin 10, Tórshavn.
Umbyggingin inniber, at verandi tilbygningur á vestursíðuni verður fluttur 1,6 m norðureftir og smalkaður við 60 cm. Víddin verður óbroytt, men ein hædd verður løgd afturat, og kjallarin undir tilbygninginum grivin út til fulla hædd.

30. apríl 2020 gevur kommunan niðurrívingar- og útgravingarloyvi til at taka verandi tilbygning niður, at grava út eystanfyri Nólsoyarstovu, undir tilbygninginum, har ein gomul grund/kjallari er, og at brekka betonggólvið í kjallaranum í Nólsoyarstovu. Hetta arbeiði var treytað av, at Tjóðsavnið fylgdi arbeiðinum.

25. mai 2020 verður byggiloyvi til tilbygning á vestursíðuni útskrivað.

27. august. 2020 verður byggiloyvið kært til Føroya Kærustovn, og samtykti Kærunevndin í lendismálum tann 10. desember 2020 at heimvísa málið til nýggja viðgerð.

25. januar 2021 bleiv avgjørt á fundi, at koyra málið umaftur, soleiðis sum Kærunevndin í lendismálum hevði sett fram krav um.

8. juni 2021 verður nýtt byggiloyvi játtað, við treytum um, at húsasíður, ið eru nærri øðrum húsum enn 4 m, skula verða eldverjuveggur (BS-bygningsdel 120), og at vindeygu nærri øðrum húsum enn 4 m verða við brandgarðin sum bæði verja fyri eldi og royki.

29. oktober 2021 verður byggiloyvið enn einaferð kært til Føroya Kærustovn.

28. apríl 2022 avgerð Føroya Kærustovnur, kærunevndin í lendismálum, at ógilda avgerðina um byggiloyvið til tilbygning til Nólsoyarstovu.
Avgerðin er grundað á, at kærunevndin í lendismálum ikki metir, at frávikini eru heimilað eftir galdandi ásetingum fyri økið.
Til síðst vísir kærunevndin í lendismálum enn einaferð á, at um Tórshavnar kommuna ynskir at játta byggingini, hevur kommunan møguleika at tillaga byggisamtyktina ella gera eina serstaka byggisamtykt fyri ognina.

Sostatt søkir Tórshavnar kommuna um loyvi til at gera tillaging í Serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna, soleiðis at byggingin kann verða játtað.

**Lýsing av málinum**
Upprunaliga var tað bert eindin A1 í serstøku byggisamtyktini nr. 4, ið var tilætlað til bústaðaendamál, har matr.nr. 50, Gongin 10, Tórshavn var partur av eind A1.

Broytingin inniber at matr.nr. 50 verður broytt til at vera eind A2, og sum eisini skal vera til búðstaðarendamál. Eindin A2 verður tillagað eftir verandi bygningi á matriklinum. Bygningurin, “Nólsoyarstova”, sum er nógv størri í vavi enn øll onnur hús á Reyni, var bygdur, áðrenn Serstaka byggisamtyktin nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina var gjørd. Tí verður mett, at fyri at kunna gera broytingar, sum eru nútíðarhóskandi, bæði til bústaðir og til útvent virksemi, er neyðugt at tillaga serstøku byggisamtyktina fyri økið.

Broytingin verður gjørd í sambandi við umsókn um byggiloyvi til endur- og umbygging av Nólsoyarstovu, mál: 20/01099.

Økið í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina verður sundurbýtt í eindirnar A1, A2, C1, C2, C3, C4, D1, D2, E og F.

<u>Eindirnar A1 og A2: Bústaðaendamál</u>

Eindirnar A1 og A2 skula bert verða nýttar til bústaðaendamál, og byggingin skal vera einans stakhús, ið standa fyri seg.

Á hvørjari ogn kunnu bert verða bygd eini sethús til eitt húski hvørt, undantikin er eindin A2, har tað kann verða bygt eitt hús til trý húskir.

Í A2-økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil, v.m.

<u>Eind A2</u>

a. Dámurin í hesum øki skal varðveitast mest møguligt, hvat ið viðvíkur byggihátti, húsastøddum, gróðuri o.ø. Serstakan týdning hevur hetta fyri teir partar, sum strikumerktir á fylgiskjali I.

b. Byggistigið kann ikki fara upp um 0,53 umframt 5 m$^2$ teknikrúm í kjallara, sum bert kann nýtast í tí parti av kjallara, ið er undir jørð. Nýtslustigið kann ikki fara upp um 2,16.

c. Tá endurbygt verður, skal, um tað er gjørligt, byggjast við somu umvídd og á sama stað sum tey niðurtiknu húsini.

d. Tá bygt verður uppí, skal fyriskipanin í b. haldast.

e. Húsini kunnu ikki gerast við meira enn trimum hæddum umframt kjallara. Hartil kunnu húsini bert gerast við sløttum taki við rekkverki omaná.

Hægsta punkt við útvegg má ikki vera hægri enn 12 m, tað er frá yvirkanti á kjallaragólvi til yvirkant á tekju. Harafturat kann rekkverk, trappurúm og hjallur á tekjuni framhaldandi vera.

h. Ikki er loyvt at byggja bilskúrar á ognini.

k. Úthús og onnur tílík smáhús skulu ikki vera størri í vídd enn 10 m$^2$.

l. Hús til bústaðir skulu ikki standa grannamarki nærri enn 2m ella nærri øðrum húsum enn 4 m, uttan so at húsasíður millum bygningarnar eru úr tilfari, ið ikki tekur við eldi.

m. Leiðingarløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum er sýnd á fylgiskjali III, ið liggur til skjals á býarverkfrøðingarskrivstovuni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í komandi eind A2 í Serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**
- Grundøkið matr.nr. 50, Tórshavn, er 236 $m^2$ til víddar.
- Ábygt er bygningur í trimum hæddum umframt kjallara.
- Byggistigið verður óbroytt 0,53. Mest loyvda er 0,5.
- Verandi nýtslustig v/kjallara er 1,9. Komandi nýtslustig verður 2,16.
- Varðveitingarvirði 2-3 er høgt sambært Tórshavnar býaratlasi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- 22/02915-1 Tillaga "Serstøk byggisamtykt nr. 4 fyri Tinagnes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna." matr.nr 50, Gongin 10.
- 21/04658-20 Avgerð hjá Kærunevndini í lendismálum frá fundi 28. apríl 2022.
- 20/03212-17 Avgerð hjá Kærunevndini í lendismálum frá fundi 10. desember 2020.
- 22/02915-5 broyting av kortið tilhoyrandi Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinagnes og gomlu Havnina.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at eind A í serstøku byggisamtykt nr. 4 verður broytt sambært skjali 22/02915-1 soleiðis, at partur (matr.nr. 50) av eind A verður broyttur til at vera eind A2 og restin til eind A1.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Kommunan hevur móttikið tvær viðmerkingar til hoyringina viðvíkjandi broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

Bæði hoyringsskrivini mótmæla broyting av serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Skjøl:**
- 22/02915-20 Viðmerkingar til hoyringsskriv til uppskot at broyta serstøku byggisamtyktina nr. 4 fyri Tinganes og Reyn.
- 22/02915-19 Mynd 2 úr túninum á Jagragrund til nýggja útbygningin á Nólsoyarstova. Hoyringsskriv.
- 22/02915-18 Mynd 1 úr túninum við Nýggjustovu niðan til húsini í Klettaskoti og hinu smáu húsini á Reyni. Hoyringskriv.
- 22/02915-17 Mótmæli at TK ætlar at broyta Serstöku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina - fyri matr.nr. 50 - við afturvirkandi kraft.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at nevndin heldur fast við avgerðina um, at eind A í serstøku byggisamtykt nr. 4 verður broytt sambært skjali 22/02915-1 soleiðis, at partur (matr.nr. 50) av eind A verður broyttur til at vera eind A2 og restin til eind A1.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur móttikið tvær viðmerkingar aftrat til hoyringina viðvíkjandi broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina. Bæði hoyringsskrivini mótmæla broyting av serstøku byggisamtyktini.

Skjøl:
- 22/02915 -27 Viðgerð av mótmælum
- 22/02915-26 Almenn hoyring í samb. við "Broyting í ásetingunum um nýtslustigi fyri 1. og 2. grundumráði - mótmæli.
- 22/02915-25 Hoyringskriv

Fleiri av evnunum, ið verða viðgjørd í mótmælunum, ganga aftur, og verða tey lýst og viðgjørd í hjálagda skjali.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 189/22 Hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.08.2022 | 31/22 | 22/03101-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 199/22 | 22/03101-1 |
| 3 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 189/22 | 22/03101-1 |

**Upprunin til málið**
Einir 5000 bygningar í Tórshavnar kommunu skulu skifta hita frá steinolju til burðardygga hitaskipan komandi árini. Bæði borgarar, vinna og tað almenna eftirspyrja heildarætlanir fyri at tryggja sær bestu og tryggastu íløguna.

Kommunan eigur at ganga á odda og stýra menningini, so samfelagsliga nyttan verður so stór sum gjørligt.

Forkvinnan í Nátturu- og umhvørvisnevndini hevur biðið umsitingina gera eina hitaætlan fyri kommununa. Við hitaætlanini gongur kommunan á odda og fær eitt stýringsamboð við ítøkiligum og greiðum loysnum, so orkuskiftið kann fremjast skjótt, fíggjarliga skynsamt, samfelagsgagnligt og haldgott fyri einstaka húsarhaldið og fyri heildina.

Orkupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu 2021-2027 fevnir serliga um tiltøk, sum kommunan sjálv kann fremja; kommunalir bygningar verða knýttir í fjarhitanetið, so hvørt tað verður útbygt, og skift verður til orkusparandi ljós og el-rikin akfør, so hvørt tað er tekniskt møguligt.

Undir teiginum *Borgarin og Orka, Grønar orkuloysnir til hús*, verður sagt soleiðis:
*“Borgarin skal komandi árini skifta oljufýr út til grøna orku, og kommunan skal kunna og vegleiða um bjálving og orkurættan útbúnað. Fyri at fleiri skulu hava møguleika at fáa jarðhita, skal tað vera møguligt, at tvey ella fleiri húski eru saman um jarðhitahol. Tórshavnar kommuna skal virka fyri, at eingir nýggir oljutangar verða settir upp í kommununi frá 2022”.*

Tekniska fyrisiting hevur heitt á SMJ um at gera útrokningar, lýsing og byrjanaruppskot til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu grundað á skrásetingar hjá felagnum av verandi hitatørvi í Tórshavnar kommunu. Útrokningarnar vísa, at skiftið frá steinolju til grøna orku til upphiting í Tórshavnar kommunu krevur íløgur fyri millum 1 og 2 milliardir krónur, alt eftir í hvønn mun ymiskar orkutøknir verða nýttar.

Fjarhiti er sera álítandi, men eisini sera kostnaðarmikil og tekur tíð at útbyggja. Skal fjarhiti veitast øllum ella teimum flestu brúkarunum í kommununi, krevur tað íløgur á 2 milliardir. Hetta merkir, at um t.d. 100 miljónir krónur árliga vórðu nýttar til at útbyggja fjarhitanetið og at binda flest allar bygningar í hetta, hevði skiftið frá steinolju til fjarhita tikið 20 ár.

Hvørki borgarar ella vinna vita sum heild, um og nær tey møguliga fáa tilboð um at knýta í fjarhitanetið. Umframt hetta verður spurt, hvat ið er mest skynsamt, um tey ikki hava útlit til tilboð um fjarhita í bræði. Nógv hava tí fingið sær jarðhita, luft til vatn-skipan, ella hava bílagt hetta, eisini í støðum, har fjarhitanetið liggur nærhendis. Onnur fáa sær oljufýr og oljutanga, sum kann vera vegna tørvandi kunnleika, óvissu, ella bíðitíð til at verða íbundin fjarhita, ella til at fáa jarðhitahol og hitavekslara. Vandi er tí fyri spilli av tilfeingi og fíggjarorku, umframt at grøna orkuskiftið verður seinkað.

Í tættbygdum øki er heldur ikki pláss fyri, ella í aðrar mátar møguligt, at hvørt hús ella hvør búeind fær egið borihol. Fáa tey tað, er vandi fyri, at hellan í dýpinum kring tættliggjandi boringar kølnar og kanska at enda frystir, sum kann minka um og at enda gera, at hiti ikki fæst úr boriholunum, og at íløgan er burturspilt. Mest skynsamt hevði verið, um grannaløg í tættbygdum býlingum og í býlingum, sum liggja langt frá

verandi og komandi fjarhitaleiðingum, fingu vegleiðing og skipaðu seg um best hóskandi felags hitaloysnir í økinum, grundaðar á varandi orkukeldur.

Skulu øll hava egið jarðhitahol, er el-netið eisini alt ov veikt og má útbyggjast munandi. Hetta ger seg serliga galdandi, um øll akfør við tíðini verða el-rikin og skulu løðast í nærumhvørvinum. Dømi er longu um øki í Havn, har ein ella fáir brúkarar av el til grønar orkuskipanir nýta alla orkuna, sum verandi el-net kann veita, og sum forðar fyri, at onnur í økinum kunnu skifta til grønar orkukeldur.

At styrkja el-netið og útbyggja fjarhitanetið til at røkka nærhendis bústaðarøkjum tekur tíð og er sera kostnaðarmikið. Tí er sera umráðandi, at kommunan er við til at skipa og kunna um útbyggingina og grøna orkuskiftið hjá borgarum og vinnu, so hesi verða best møguligt vegleidd.

Til ber at minka um nakrar av avbjóðingunum av grønum orkuloysnum, m.a. trýstið á el-netið, við at gera felags nærhitanet millum fleiri brúkarar. Hetta kann gerast á ymsan hátt og soleiðis, at sum mest av hita verður framleiddur, tá nóg mikið av streymi er tøkur. Kommunan kann um neyðugt seta krøv, eitt nú til orkuloysnir í nýggjum býlingum, nýggja bygging og í sambandi við serstakar byggisamtyktir.

**Lýsing av málinum**
Fyri at stuðla uppundir orkuskiftið hjá borgarum, stovnum og vinnu er neyðugt við eini hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu. Fyri at gera slíka ætlan er neyðugt at gera útrokningar og raðfesta, soleiðis at kommuna, borgarar og vinna í skiftinum frá steinolju til varandi orkukeldur kunnu taka skynsamar avgerðir út frá fyriliggjandi og komandi fortreytum. Slík ætlan skal kunna um, hvørjar grønar hitaloysnir verða tøkar og/ella eru mest skynsamar í hvørji búseting og hvørjum býlingi. Eisini fer ætlanin at vísa veitarum innan økið, hvønn veg tað ber, og hvørja vitan, førleikar og orkuføri, ið tørvur verður á.

Umhvørvisdeildin hevur saman við SMJ gjørt eitt upplegg til, hvussu tað er møguligt at arbeiða víðari við málinum fyri at rokna út, lýsa og kunna um, hvørjar grønar orkuloysnir eru mest skynsamar í teimum ymsu búsetingunum og býlingunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Víst verður til skjal 22/03101-5 Frágreiðing - Orkuætlan fyri Tórshavnar kommunu fyri nærri kunning um verkætlanina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Orkupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu 2021-2027.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/03101-5 Frágreiðing - Orkuætlan fyri Tórshavnar kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | x | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | x | x |

| | **Býráðsfundur**<br>01. september 2022 | Blað nr.: 733<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **X** | **x** | **x** | **x** |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Á karminum fyri konto 6177, orkupolitikkur, eru fyri 2022 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum eru kr. 1.000.000 játtaðar til at fyrireika og at leggja fjarhita inn í kommunalar bygningar. Til sama endamál er tørvur á kr. 3.500.000 afturat í 2022. Verða kr. 1.500.000 játtaðar til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu, verða sostatt kr. 2.000.000 eftir til onnur orkuátøk í 2022.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 6177 | Nýggj | Hitaætlan fyri TK | Ja | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022-2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:
- farið verður undir at gera eina hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu sum omanfyri lýst,
- at játtaðar verða kr. 1.500.000 av deild 6177 til endamálið, sum omanfyri lýst,
- at málið verður beint í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og heita á umsitingina at gera uppskot til sáttmála við SMJ at leggja fyri fíggjarnevndina og síðani býráðið.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við náttúrú- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Fyrst varð atkvøtt um soljoðandi broytingaruppskot frá Bjørg Dam: Mælt verður til at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og fíggjarnevndini við teirri broyting, at umsitingini verður heimilað at gera sáttmála sambært tilmælinum og innanfyri ásetta fíggjarkarmin á kr. 1.500.000.

Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt.

## 190/22 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 48/20 | 17/03154-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 11/21 | 17/03154-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2021 | 47/21 | 17/03154-1 |
| 12 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 329/21 | 17/03154-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.03.2022 | 15/22 | 17/03154-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 79/22 | 17/03154-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 68/22 | 17/03154-1 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.08.2022 | 32/22 | 17/03154-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 201/22 | 17/03154-1 |
| 18 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 190/22 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum ‘Grøna leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:

1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:

1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og $CO_2$-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:

- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og CO2-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.
2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$- sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í seinasta ískoyti og framløgu varð nevnt, at fortreytin fyri at fáa eina grønari kommunu við 50% lægri $CO_2$-útláti í 2025 er, at kommunan játtar 13,5 mió. kr. um árið, umframt tað sum er játtað á rakstri og íløgu, íalt 15 mió. kr. hvørt ár í 6 ár 2020-2025, ella í alt 90 mió. kr.

Í 2020 vórðu játtaðar 5,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 3,5 mió. kr. vóru beinleiðis til orkupolitikkin.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 lækkar upphæddin til 4,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. fara til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 2,5 mió. kr. fara beinleiðis til orkupolitikkin.

Uppskotið til almenna orkupolitikkin (tekstur), ið byggir á upprunaligu ætlanina, at minka $CO_2$-útlátið 50%, er næstan klárt. Tó er áramálið nú bert 4 ár fram til 2025, og tí má árliga upphæddin til íløgur verða samsvarandi størri, uml. 22 mió. kr. um árið í 4 ár 2022-2025, um málið skal røkkast.

Ætlanin er at seta í verk gerð av faldara, við uppseting, tekningum og prenti og at fíggja hetta av rakstri, kontu 6610.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið at gera faldara, ið byggir á upprunaligu ætlanina í Orkupolitikkinum og Grønu leiðini, verður sett í verk og fíggjað av rakstri, konto 6610.

Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% í 2025 skal leingjast, vísandi til at neyðugur peningur ikki er settur av í 2020 og 2021.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leingja málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% til 2027.

**Ískoyti:**
Elsa Berg, nevndarlimur, hevur biðið um at fáa málið lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina aftur. Hon vísir á, at á fyrsta fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini fekk nevndin eina frágreiðing frá umsitingini um umhvørvis- og orku politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Har varð staðfest, at vit fara beint øvugtan veg í mun til okkara útlátsmál, í og við at útlátið enn er í øking og at neyðugt er við sterkari átøkum og meira fígging.

Elsa Berg ynskir at nevndin viðger støðuna, og hvat skal til av átøkum og pengum, fyri at vit røkka málinum.

Hetta varð lýst, tá málið bleiv samtykt, men má dagførast.

Kunnað verður um málið og framløga.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna skal $CO_2$ útlátið hjá kommununi minka við 50% í 2027 í mun til 2016, og hetta skal gerast við at leggja dent á 3 høvuðsmál:

1. GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027
2. LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027
3. EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERÐA ELRIKNIR Í 2027

Á leið 90 mió. kr. skulu fram til 2027 brúkast á orkuøkinum, um hesi mál skulu røkkast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina ætlan fyri 2022, fyri hvørt av teimum trimum orkumálum, sum skal tryggja, at ferð kemur á grøna orkuskiftið í kommunala geiranum. Harumframt verður uppskot lagt fram um, hvussu umsitingin kann skipa seg í arbeiðsbólk og arbeiða víðari við mannagongdum og ársfrágreiðingum fram til 2027.

Útgangsstøði er tikið í eini samlaðari játtan á 8. mió. kr. til orkuátøk í 2022. Tað letur seg ikki gera at røkka orkumálunum við umrøddu játtanini, men kann hon vera fyrsta stig til at raðfesta orkuøkið hægri komandi árini.

*<u>ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027</u>*
Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 17 oljufýringar hjá TK skiftast til grøna orku á hvørjum ári frá 2021. Í 2021 vóru 8 oljufýringar skiftar út við fjarhita ella hitapumpu, og kommunan setir ikki nýggjar oljufýringar upp.

Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging. Hon kann nýta orku frá alskyns orkukeldum, og kann hon samvirka við aðrar partar av orkuinfrakervinum t.d. taka ímóti avlopsorku frá vindmegi og aðrari elframleiðslu, sum verður alsamt meiri týðandi í framtíðar grøna orkuinfrakervinum. Fjarhitanetið verður nýtt til at binda orkuframleiðslu og nýtsluna saman í kommununi og at gagnnýta orku, sum annars fer til spillis. Tí mælir umsitingin til at raðfesta íbinding í fjarhitanetið í 2022.

Eisini eru størri verkætlanir, ið umsitingin metir eiga at verða raðfestar komandi árini.

**Umsitingin ætlar at brúka 3,9 mió. kr. til at knýta 7 almennar bygningar í fjarhitaskipanina umframt 1,5 mió. til eitt orkuátak sambært fylgiskjali 1.**

_ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027_
Gøtuljós umboða áleið 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá kommununi. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar hesin parturin av el-nýtsluni á leið ein triðing, umframt at útreiðslan av hesari íløguni av tí sama verður spard aftur eftir fáum árum.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED hvørt ár. Tórshavnar kommuna eigur uml. 9.000 gøtuljós, av hesum eru áleið 2.600 skift til LED.

Higartil eru 710 gøtuljós skift í 2021.

**Umsitingin ætlar at brúka 1,6 mió. kr. til at skifta 570 gøtuljós til LED í 2022 sambært fylgiskjali 1, umframt at skifta gøtuljós fyri ta íløguupphædd frá 2021, sum ikki verður brúkt í ár, væntandi á leið kr. 500.000,-.**

_ORKUMÁL 3 - EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027_
Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 15 bilar skiftast til el hvørt ár frá 2021.

Í 2020 vóru 9 elbilar í kommununi. Í dag eru 13. Harafturat eru 2 elbilar skiftir út við nýggjar elbilar. Uml. 22 bilar skulu eftir ætlan skiftast í 2022. Aloftast stendst ein eykaútreiðsla av at skifta til el-bil heldur enn til ein bil riknan við steinolju, m.a. til løðistøðir o.a.

**Umsitingin ætlar at brúka 1 mió. til eykaútreiðslur av at skifta 10 akfør til el í 2022 sambært fylgiskjal 1.**

_Ætlan 2022-2027_
At gera mannagongdir, útlátsrokningar- og framskrivingar krevur nógva tíð og orku. Um kommunan verður betri til at skapa virði burturúr dáta um orkunýtslu- og framleiðslu kunnu vit seta í verk loysnir, sum tryggja at arbeiðið ber á mál.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skráseta orkudáta í Energykey, sum er ein skipan til at samla dáta og hava eftirlit við orkuøkinum í kommununi. Tá skipanin er klár, kann hon m.a. brúkast til at gera støðulýsingar og ætlanir fyri, hvussu kommunan fær sum mest burturúr sínum orkuíløgum, og geva innlit í, hvar tað er mest átroðkandi at minka um $CO_2$-útlátið og orkunýtsluna.

**Umsitingin ætlar at raðfesta at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing umframt eina ætlan fyri 2023-2027.**

Áðrenn Energykey verður klárt, verður neyðugt at dagføra útlátstølini fyri 2019, 2020 og 2021. Harumframt krevst eyka arbeiði at fáa øll dátu skrásett í Energykey, soleiðis at skipanin fevnir um alt orkuøkið og ikki, sum støðan er nú, bert bygningar. Umsitingin hevur í hesum sambandi umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at eitt fólk verður sett í eitt verkætlanarsett starv til útiloðkandi at arbeiða við at dagføra útlátstølini og skráseta í Energykey.

Fyri at koma á mál við orkupolitikkinum er eisini neyðugt at menna samstarvið millum deildirnar. Fyrst og fremst eru tað bygningsdeildin, verkstaðið, vatn- og gøtuljósdeildin og umhvørvisdeildin sum eru beinleiðis knýtt at teimum 3 orkumálunum umvegis dagliga virksemið. Neyðugt verður at møtast regluliga fyri at fylgja støðuni, umframt at gera ætlan fyri 2023-2027.

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini leggja hervið uppskot fram um ætlanina fyri tey trý orkumálini í 2022:

- 3,9 mió. til at knýta 7 bygningar í fjarhitaskipanina

- 1,5 mió. til orkuátak
- 1,6. mió. til at skifta 570 gøtuljós til LED
- 1 mió. til at skifta 10 akfør til el

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlan m.a. at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing og ætlan fyri 2023-2027.

Mælt verður til at nýta kr. 200.000 av konto nr. 6610 hjá umhvørvisdeildini frá játtanini fyri 2021 til verkætlanarsett starv í uml. 4 mánaðir til at arbeiða við skráseting í Energykey og at dagføra útlátstølini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt at nýta aðrar kr. 100.000 til samskifti. Eisini verður heitt á umsitingina um at arbeiða víðari við orkuskifti í bygningum og koma aftur í nevnd við nýggjum tilmæli.

**Ískoyti:**
Elsa Berg biður um at fáa málið at skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Bjørg Dam um at beina málið í náttúru- og umhvøvisnendina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum, 4 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam,Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging, og politiskt ynski er at binda fleiri kommunalar bygningar í hesa skipan. Bygningarnir í uppskoti til íbinding í 2022 eru hesir:

- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Fimi-HB-B36
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin
- Brúni skúli

Viðmerkjast skal, at Gundadalshøllin verður ikki íbundin, fyrr enn avgerð er tikin, um høllin skal umbyggjast, útbyggjast ella byggjast av nýggjum. Tryggjað verður, at klárt er at binda í høvuðsleiðina hjá fjarhitanetinum, tá avgerð er tikin hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at fyrisitingin fær heimild til:

At flyta 1 mió. av stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705, Orkupolitikkur, til nýggja verkætlan "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovnsnummar 6177 til at gera prosjekt, kostnaðar- og tíðarmeting til útboð av at íbinda nevndu bygningar í fjarhitanetið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við tí ískoyti, at heimild eisini verður givin til at seta arbeiðið í gongd at binda hvønn bygning sær í fjarhitanetið. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í mars 2022 vórðu 1 mió. kr fluttar av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, «Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar» undir stovnsnummari 6177 til at prosjektera, fyrireika og fara undir arbeiðið. Bygningarnir, har arbeiðið við at innleggja nýggja hitaskipan er boðið út, eru fylgjandi:
- Eldrasambýlið oman Hoydalar
- Tilhaldið í Tórsgøtu
- Tannlæknastovan
- Móttøkuhúsið (Listasavnið)
- Brúni skúli (Fríðriksgarður)
- Guli skúli (Ytri skúli)
- Liðahúsini
- Gundadalshøllin

Arbeiðið varð boðið út umvegis útboðsportalin hjá Tórshavnar kommunu, og bjóðaðu í minsta lagi tvey feløg upp á arbeiðið við hvønn av bygningunum. Tikið er av tilboðunum frá fylgjandi feløgum: HVS Tænastan, Bjørnin, Orkuloysnir, Maria Poulsen.

Tíðarætlanin fyri arbeiðið er gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Grevstrararbeiðið og tað at taka upp og burturbeina oljutangar verður boðið út í næstum. Eftir ætlan verður farið undir arbeiðið, so tað er liðugt í 2022. Íroknað kostnað til at gera útbjóðingartilfar, sjálvt arbeiðið við grevstri, at leggja fjarhita inn, taka burtur oljutangar, og íbindingargjald verður samlaði kostnaðurin 4,5 mió. kr. Sostatt resta tað 3,5 mió. kr í fyri at útinna arbeiðið sambært innkomnu tilboðunum.

Eisini tíðarætlanin fyri arbeiðið við at binda skúlan á Argjahamri í fjarhitanetið verður gjørd í samráð við Fjarhitafelagið. Tað arbeiðið verður væntandi boðið út í næstum, soleiðis at neyðuga tilfarið kann fáast til vega, áðrenn farast skal undir arbeiðið.

Verandi árliga oljunýtslan í omanfyri nevndu bygningum, íroknað skúlan á Argjahamri, er knappar 1.195.000 litrar. Tá $CO_2$-útleiðingin av fjarhita og elframleiðslu verður drigin frá, er útroknaða árliga minkingin av útleiddum $CO_2$ av íløguni 284.528 kg $CO_2$ og 0,065 kg/ $CO_2$ pr. kr. pr. ár. Við verandi fjarhitakostnaði er væntandi, at útreiðslurnar til upphiting minka við o.u. kr. 190.000.

Á karminum fyri konto 6177, orkupolitikkur, eru fyri 2022 játtaðar kr. 8.000.000. Av hesum eru kr. 1.000.000 játtaðar til at fyrireika og at leggja fjarhita inn í kommunalar bygningar. Til sama endamál er tørvur á kr. 3.500.000 afturat í 2022. Verða kr. 1.500.000 játtaðar til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu og kr. 1.000.000 til verkætlan um heita vatnið á Lygnnesi í Kollafirði, verða sostatt kr. 1.000.000 eftir til onnur orkuátøk í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin fyri Umhvørvisdeildina og leiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at:
- játtaðar verða kr. 3.500.000 av konto 6177, LK61705, Orkupolitikkur, til verkætlanina L61707, "Fjarhitaskipan til kommunalar bygningar" undir stovns-nummari 6177, til at gera arbeiðið liðugt við at binda áður nevndu kommunalu bygningar í fjarhitanetið,
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin ger og eftirsendir nevndini tíðarætlan.

Fíggjarnevndin 24. august 2022: Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið. Nevndin viðmerkir, at tíðarætlan fyri hvønn bygning sær skal fyriliggja, áðrenn arbeiðið verður sett í verk.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

# 191/22 Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.04.2022 | 18/22 | 21/04609-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 105/22 | 21/04609-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 164/22 | 21/04609-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.08.2022 | 33/22 | 21/04609-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 22.08.2022 | 34/22 | 21/04609-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 217/22 | 21/04609-1 |
| 7 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 191/22 | 21/04609-1 |

**Upprunin til málið**
Á sumri 2014 vórðu gjørdar áhugaverdar jarðhitaboringar á Lygnnesi í Kollafirði, haðani tað rann vatn upp úr holunum ‘av sær sjálvum’ vegna yvirtrýst í undirgrundini. Hitin á hesum vatni er umleið 27 °C, og tað hevur funnið eina fasta legu, og har renna tilsamans umleið 16 tons av vatni upp um tíman.

Til samanbering er kelduvatn ella brúksvatn í Føroyum vanliga einar 9-10 °C, tá tað kemur úr krananum, so hetta vatnið er 17 °C heitari, og í orku svarar henda nøgd av vatni til 350.000 litrar av olju. Hetta er gott og væl tað, sum Svimjihøllin í Gundadali, Eysturskúlin og Lágagarður tilsamans brúka um árið í olju til upphiting.

Á Lygnnesi, har vatnið streymar upp, eru bert vanlig sethús, sum kunnu fáa gagn av heita vatninum til upphiting. Um ein rørleiðing á umleið 1 km verður løgd frá heitu kelduni, kundu kommunalu stovnarnir, ið liggja inni við Sjógv (skúlin, ítróttarhøllin, svimjihylurin, læknaviðtaluhølið o.a.) brúkt eina felags hitaskipan grundað á heita vatnið.

**Lýsing av málinum**
Fleiri uppskot hava verið frammi um, hvussu heita vatnið á Lygnnesi kann nýtast til upphiting av kommunalu bygningunum, sum liggja inni við Sjógv. Enn hevur einki borið á mál.

Umsitingin metir, at tað er týdningarmikið, at kommunan umsíðir fær sett í verk eina grøna verkætlan at gagnnýta heitu kelduna á Lygnnesi. Nýggi barnagarðurin Kura verður upphitaður við jarðhita. Sostatt høvdu allir kommunalu bygningarnir í Kollafirði verið upphitaðir við varandi orkukeldum.

Tað er sera umráðandi, at vit sum kommuna fylgja við allari tøkniligari framgongd og eru við í áhaldandi menningini innan grønar orkukeldur. Í hesum liggur eisini, at vit gagnnýta ta grønu orku, sum er tøk at brúka.

Býráðið í Tórshavnar kommunu samtykti í 2016 Umhvørvispolitikkin ‘Grøna Leiðin’, har kommunan hevur sett sær sum mál at skerja $CO_2$-útlátið við at gera ymisk orkusparandi átøk. Eitt av málunum er at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur. Somuleiðis er ein orkupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu, har stórur dentur verður lagdur á at leggja um til grønar ella varandi orkukeldur. Hetta tí, at upphiting av bygningum er størsti orkuslúkurin í $CO_2$-roknskapinum hjá Tórshavnar kommunu, nevniliga 41%. Umlegging frá olju til varandi orkukeldur í sambandi við upphiting er avgerandi, um vit sum kommuna skulu røkka málinum, sum vit hava sett okkum um 50% minni útlát av $CO_2$ í 2027. Burðardygg orka er somuleiðis eitt av heimsmálunum hjá ST.

Ítøkiliga verkætlanin, at gagnnýta heitu kelduna í Kollafirði til upphiting av kommunalu bygningunum inni við Sjógv, er tískil beinleiðis í tráð við umhvørvispolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

Nevnast kann eisini, at hóast hesir kommunalu bygningar verða upphitaðir við orku frá heitu kelduni, so er framvegis hitaorka tøk til at knýta umleið 125 sethús aftrat í orkuna frá heitu kelduni. Tað kundi t.d. verið húsini, sum liggja eystanfyri skúlan við Sjógv, ella nýggja útstykkingin á Lygnnesi.

Tað kundi eisini verið áhugavert at gjørt eitt uttandura vælveruøki við hitapottum ella líknandi á økinum við svimjihylin, um tað er nóg mikið av orku til hetta.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er umleið 7.500.000 kr. Tó verður mælt til at gera eina meiri nágreiniliga meting av samlaða kostnaðinum fyri ætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Grøna Leiðin – umhvørvispolitikkur hjá Tórshavnar kommunu
Lóg um grundvatn er í gerð, verður væntandi borin UVMR í apríl 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01812 - Verkætlan - Vatnprøvar og pumputest í Kollafirði viðv. aldur á vatni, vatnkvalitetur og vatnmongdir.
22/00627 Áheitan um grøna orkuloysn til Kollafjarðar skúla

**Umhvørvisárin**
Henda verkætlanin viðførir, at nevndu bygningar hjá kommununi fáa grøna orku til upphiting. Í fyrstu atløgu minkar hetta um $CO_2$-útlátið hjá hesum bygningum við umleið 70-75% (svarar til 136 tons $CO_2$ árliga). So hvørt sum SEV leggur framleiðsluna av el- orkuni frá olju til vind, vatn ella annað, vil $CO_2$-útlátið hjá hesum bygningum minka enn meira.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Grøv til leiðingarnar verður grivin fram við vegnum. Tá hetta arbeiði verður gjørt, verður vegurin samstundis dagførdur við gongubreyt omaná leiðingunum í samstarvi við Teknisku deild.

**Skjøl**
21/04609-2 Frágreiðing frá 2016 frá Jarðfeingi "Jarðhitaboringar á Lygnnesi, Kollafjørður"
21/04609-3 Útrokningar_orkunýtsla_Kollafjørður
22/00627-1 Áheitan um grøna orkuloysn til Kollafjarðar skúla

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**
Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er umleið 7.500.000 kr. Mælt verður til at gera eina meiri nágreiniliga meting av samlaða kostnaðinum fyri ætlanina.

Við verandi prísum hjá Magn og SEV verða rakstrarútreiðslurnar mettar at vera minst 50% lægri.

Viðlíkahaldið av hesari orkuskipan umfatar eftirlit av hitapumpum og vatnpumpum. Harafturímóti slepst undan viðlíkahaldi av ketlum, skorsteinum og oljutangum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðararnir á Bygningsdeildini og Umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin heimilar Umhvørvisdeildini, í samstarvi við Bygningsdeildina, at stovna nýggja verkætlan "Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar" undir stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705. Samstundis verður biðið um eina rammuupphædd áljóðandi 500.000 kr. at brúka til uttanhýsis ráðgeving at gera eina nágreiniliga váða- og kostnaðarmeting av verkætlanini, og at fyrireika sjálva ætlanina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Útsett.

**Ískoyti:**
Royndarboriholið varð av misgáum borað á privatum øki. Núverandi bústaðareigarar hava vent sær til kommununa um at finna eina loysn. Hvussu málið verður loyst er ein partur av fyrireikingaruppgávuni til verkætlanina.

Kelduvatn (grundvatn) og brúk av hesum er ikki løgskipað enn. Eitt uppskot til løgtingslóg um grundvatn kemur til hoyringar í heyst. Lógin byggir á verandi løgtingslóg um vatnið í Sumbiarbergholinum (sí skjal 21/04609-10). Stutt sagt: Vatnið er landsogn, og kommunan kann søkja um loyvi at gagnnýta vatnið.

Partur av fyrireikingararbeiðinum til verkætlanina er at staðfesta, hvussu vatnið, ið er landsogn, kann førast frá privatøki og inn í ein uppsamlingsbrunn á kommunalum øki. Hendan fyrireiking fevnir, umframt tað vísindaliga, eisini um løgfrøðiligu spurningarnar hesum viðvíkjandi.

Náttúru- og umhvørvisnevndin samtykti uppskotið tann 05. apríl 2022.
Í upprunauppskotinum varð biðið um rammuupphædd áljóðandi 500.000 kr.

Síðani er umsókn send Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum um "stuðul til verkætlanir, sum útvega nýggja vitan um orkumøguleikar úr undirgrundini" saman við Jarðfeingi (sí skjal 21/04609-7), har søkt verður um 1.000.000 kr. Treytin er, at kommunan veitir somu upphædd til verkætlanina (sí skjal 21/04609-9). Verkætlanin verður sostatt partvís gjørd í samstarvi við Jarðfeingi.

**Skjøl:**
21/04609-7 Umsókn til UVMR um orkustuðul – Kollafjørður
21/04609-9 Reglugerð-fyri-stuðulsjáttan-til-verkætlanir-innan-orkumøguleikar-úr-undirgrundini
21/04609-10 Løgtingslóg um vatnið í Sumbiarbergholinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at upprunatilmælið verður broytt, og verður soljóðandi:

Tekniski stjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin heimilar Umhvørvisdeildini, í samstarvi við Bygningsdeildina, at stovna nýggja verkætlan: "Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar" undir stovnsnummar 6177, Orkuátøk, LK61705. Samstundis verður biðið um eina rammuupphædd áljóðandi 1.000.000 kr. at brúka til nágreiniliga váða- og kostnaðarmeting av verkætlanini, at sniðgeva løgfrøðiligu, jarðfrøðiligu og teknisku loysnina fyri samlaðu verkætlanina og at fyrireika sjálva ætlanina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umhvørvis- og Vinnumálaráðið hevur játtað stuðul til verkætlanina sambært umsóknini, ið send varð. Stuðulin er áljóðandi 1.000.000 kr, treytað av at verkætlanin er byrjað í seinasta lagi triðja ársfjóring 2022, og at Tórshavnar kommuna veitir somu upphædd til verkætlanina.

Verkætlanarleiðslan og fíggjarligi raksturin verður hjá Tórshavnar kommunu. Jarðfeingi er við sum jarðfrøðiligur serkunnleiki og fakligur samstarvsfelagi.

Í sambandi við leiðingina, sum skal leggjast frá Lygnnesi til kommunalu bygningarnar, verður kannað, um til ber at leggja vatnrørið í niðara borði omanav landsvegnum omanfyri Lygnnes. Á henda hátt slepst undan at grava upp veg ella gongubreyt. Eisini er møguligt at leggja rørið, so møguligir avstikkarar og "nærhitaskipanir" kunnu gerast til býlingarnar í økinum norðureftir móti kommunalu bygningunum.

**Skjøl:**
21/04609-12 UVMR játta umsókn - Lygnnesi i Kollafirdi.pdf

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til at:
- Náttúru- og umhvørvisnevndin heimilar teknisku umsitingini at stovna nýggja verkætlan: "Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar" undir stovnsnummari 6177, Orkuátøk, LK61705.
- nevndin játtar eina rammuupphædd áljóðandi kr. 1.000.000 til at fyrireika og fara undir verkætlanina.
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. august 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Á vári 2022 heitti forkvinnan í Náttúru- og umhvørvisnevndini á fyrisitingina um at fyrireika mál og bera so í bandi, at heita vatnið í Lygnnesi í Kollafirði verður gagnnýtt, og um at søkja Umhvørvis- og vinnumálaráðið (UVMR) um stuðul til endamálið.

UVMR hevur játtað kr. 1 mió. fyri 2022.

Verkætlanarleiðsla og fíggjarstýring eru hjá Tórshavnar kommunu.

Stuðulin er treytaður av, at verkætlanin byrjar í triðja ársfjóringi 2022, og at Tórshavnar kommuna veitir somu upphædd til verkætlanina fyri 2022. Komandi ár er væntandi møguleiki at søkja somu upphædd til verkætlanina.

Kelduvatn (grundvatn) og nýtsla av hesum er ikki enn skipað í lóg. Landsrættardómur í máli um Sumbiarbergholið hevur tó staðfest, at jarðeigarar ikki eiga rætt til vatn í undirgrundini. Vatnið er landsogn, og kommunan kann søkja UVMR um loyvi at gagnnýta vatnið. Uppskot til løgtingslóg um grundvatn, ið staðfestir hetta sama, er ávegis til hoyringar og byggir á løgtingslóg um vatnið í Sumbiarbergholinum (sí skjal 21/04609-10).

Fyribils kanningar hjá Teknisku fyrisiting benda á, at verkætlanin sannlíkt kann gerast fyri munandi lægri kostnað enn áður mett, og helst skjótari, tó við fyrivarni fyri veitingartíð í sambandi við, at útgerð, m.a. til at hitaveksla vatnið, skal fáast til landið.

Um Tórshavnar kommuna skal gagnnýta játtaða stuðulin frá UVMR á 1 mió. kr, skal samsvarandi upphædd játtast skjótast gjørligt og ikki seinni enn í 3. ársfjórðingi 2022. Verður tað ikki gjørt, fellir stuðulin burtur.

Verða 1 mió. kr játtaðar til endamálið av stovnsnummari 6177, Orkuátøk, LK61705, umframt 1,5 mió. kr. til hitaætlan fyri Tórshavnar kommunu og 3,5 mió. kr til verkætlan um at knýta kommunalar bygningnar í fjarhitanetið (umframt 1 mió. kr., sum longu eru játtaðar til endamálið), eru 1 mió. kr frá játtanarkarminum fyri 2022 eftir á 6177 til aðrar orkuverkætlanir.

**Skjøl:**
21/04609-12 UVMR játta umsókn - Lygnnesi i Kollafirdi.pdf

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | | **Upphædd** |
| 6177 | LK61705 | Orkuátøk | 6177 | Nýggj | Heita vatnið á Lygnnesi knýtast í kommunalar bygningar | Ja | | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Bygningsdeildini og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at:

- Náttúru- og umhvørvisnevndin heimilar teknisku umsiting at stovna nýggja verkætlan fyri at knýta heita vatnið á Lygnnesi í kommunalar bygningar undir stovnsnummari 6177, Orkuátøk, LK61705
- Játtaðar verða kr. 1.000.000 til beinanvegin at fara undir verkætlanina
- Náttúru- og umhvørvisnevndin heimilar umsitingini at søkja um loyvi til og at gera sáttmála við Umhvørvis- og vinnumálaráðið um nýtsluræætt til grundvatnið
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 22. august 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og heita á umsitingina um at lýsa møguligar linjuføringar.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býraðið.

Málið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina, tá ið endaliga verkætlanin er lýst.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Einmælt samtykt.

## 192/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 176/22 | 22/00009-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 167/22 | 22/00009-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 215/22 | 22/00009-1 |
| 12 Býráðsfundur | 01.09.2022 | 192/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 01. september 2022:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 18:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Annika Olsen |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen | Turið Horn |
| | Helena Dam á Neystabø | |